

www.oljan.fo

**Jan Müller** 14 - 04 - 2012

# Oljuboring kann ávirka sigling hjá Norrønu

Um so er at boringin á føroyska landgrunninum í summar fer at geva eitt positivt úrslit, so fer Smyril Line at umhugsa sína støðu í sambandi við at fara undir aftur sigling uppá Norra. Í hvussu er hetta ein nýggj støða. Nakað soleiðis segði stjórin í Smyril Line, Rúni Poulsen við Dag og Viku fríggjakvøldið. Norski partaeigarin í føroyska reiðaríinum Supply Service í Leivík, Per Sævik sigur við norska blaðið Sunnmørsposten, at Norrøna eigur at taka uppaftur siglininga uppá Norra. Supply Service er størsti partaeigarin í Smyril Line við 34% og eigur Per Sævik helvtina av partapeninginum. Við Kringvarpið segði stjórin í Smyril Line, at hetta er ikki partur av framtíðar ætlanini hjá fyritøkuni, og at sum støðan er í dag er ikki grundarlag fyri at taka upp aftur siglingina uppá Noreg. Avgerðin at gevast at sigla uppá Norra stendur við, til nýggir møguleikar vísa seg, og her nevndi hann eitt oljufund í Føroyum sum ein møguleika fyri at taka uppaftur rutuna til Norra. Mynd - Frá navngevingini av Sjóborg í Bergen herfyri. Rúni Poulsen, stjóri á Smyril Line her saman við tveimum av høvuðseigarunum í Smyril Line, Osmundi Justinussen og Per Sævik. Myndatøka oljan.fo/jan Müller.